# Tørvur á andaligum barnafløgum



**-Tað eru stórt sæð ongar aðrar barnafløgur við andaligum tónleiki, ið eru hampuliga nýggjar, sigur Anita Tausen av Toftum, sum saman við manninum Oddmar Tausen hevur givið út barnafløguna "Vit eru glað"**

FLØGUÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Í síðsta mánaða kom ein nýggj barnafløga út. Fløgan eitur "Vit eru glað", og eru tað ung á Skálafjørðinum, ið syngja andaligar barnasangir. Á fløguni eru 11 sangir og longdin á fløguni er umleið ein hálvan tíma. Fløgan inniheldur 3 spildurnýggjar sangir, meðan restin so eru gamlir sangir, ið td. hava verið brúktir í sunnudagsskúlunum kring landið.

Tað eru hjúnini Anita og Oddmar Tausen av Toftum, ið geva fløguna út.

- Grundin til, at vit valdu at geva eina tílíka fløgu út er, at vit hildu, at tað var tørvur á eini andaligari barnafløgu. Tað eru stórt sæð ongar aðrar barnafløgur við andaligum tónleiki, ið eru hampuliga nýggjar, sigur Anita. - Tað eru uml. 15 ár síðani Vanja var í hæddini við kristiligum barnasangum, men síðani tá er nærum onki komið út av andaligum tónleiki fyri børn, leggur hon afturat.

At fløgan so kom út nærum samstundis, sum ein onnur andalig barnafløga, er bert av tilvild.

- Vit hava vitað av hvørjum øðrum alla tíðina, men tað var ikki ætlanin, at fløgurnar skuldu koma út so samstundis, sum tað nú einaferð varð til, nevnir Anita -Men, leggur hon afturat, eg haldi ikki, at hetta hevur ávirkað søluna av fløgunum. Báðar fløgurnar hava selt væl.

## Ung, ið standa aftanfyri

Fløgan er merkt av, at tað eru ung fólk, ið bæði syngja og spæla. Tað eru 11 ymiskar røddir á fløguni. Tey ið eiga røddirnar telja 162 ár tilsamans, og gevur hetta okkum ein miðalaldur á uml. 15 ár. Tó liggja sangararnir í aldrunum frá 10 ár til fyrst í 20´ini.

Heitislagið á fløguni hevur 20 ára gamla Hervør S. Djurhuus smíðað. Símun J. Hansen eigur eisini eitt lag á fløguni.

Bert fýra tónleikarar á fløguni, harav tríggir av teimum bert spæla við í einum sangi. Ungi producarin, Hans Poulsen, spælir sjálvur øll ljóðførini, uttan, sum sagt, til henda eina sangin, har hann fær hjálp av akk. guitar og tvørfloytuspæli.

Av teimum 11 sangarunum á fløguni eru bert tveir dreingir, ið syngja við.

- Tað eru so fáir dreingir, ið syngja í hasum aldrinum. Harafturat er tað ikki lætt at fáa dreingir at syngja yvirhøvur. Td. hava vit eitt barnakór úti á Toftum, sum telur 14 børn, og har er bert ein drongur við, greiðir Anita frá.

## Ikki í studio

Hendan fløgan er ikki sum flest allar aðrar fløgur av tí, at hon er als ikki upptikin í studio. Hon er nevnliga tikin upp heima í stovuni hjá producaranum Hans og konuni Margrethu (M. syngur bakrøddir).

- Grundin til, at vit valdu at gera soleiðis er, at Hans metti ikki, at tað var neyðugt at fara í studio. Hann hevði sjálvur góðar umstøður fyri upptøku, og útgerðina átti hann eisini alla sjálvur.

Talan var í byrjanini um at taka sjálvan tónleikin upp heima hjá Hans, og sangin í studio, men niðurstøðan varð, at tað var als ikki neyðugt at fara í upptøkuhølið tá umstøðurnar vóru so góðar hjá Hans. Um farið hevði verið í studio, hevði tað verið í Havnini, og hevði hetta gjørt upptøkurnar munandi strævnari.

## Á ferð runt í Føroyum

Tá fløgan kom út í summar høvdu tey nakrar konsertir her á meginøkinum. Í Runavík, Havn og Klaksvík. Men av tí, at hetta var mitt í summarfrítíðini, og fólk skuldu út at ferðast, bar ikki til at halda fleiri konsertir, sjálvt um áhugi var fyri tí. T.d vóru fólk úr Suðuroy, Sandoy og Vágunum við til hesar konsertirnar, og ynsktu tey eisini at fáa ungu eysturoyingarnar tann vegin. Og er hetta júst tað, ið ætlanin er at gera nú. Komandi vikuskiftini verða tríggir konsertir hildnar í ávikavist Øravík, Giljanesi og Skopun.

Av tí at ferðast verður so "langt" við fløguni hava fyrireikararnir gjørt av at "víðka" konsertina eitt sindur. Umframt løg av fløguni, luttekur eisini eitt barnakór og ein sangbólkur, og skipað verður eisini fyri felagssangi. Eitt slag av fingradukkum eru eisini gjørdar til hetta høvið, ið skulu framføra eitt slag av evnisdrama á konsertunum.

Kostnaðurin fyri konsertirnar er 30 kr. Hesin peningurin verður brúktur til at fíggja flutning av sangarum, útgerð, plakatir, lýsingar, leigan av høli o.s.fr. - Vit vóna sjálvandi eisini at selja nakrar fløgur á støðunum vit vitja, sigur Anita at enda.

Konsertirnar, ið ætlanin er at hava verða:
í Vágunum: Høllin á Giljanesi, sunnud. 30. sep. kl. 15.00
í Sandoy: Bygdarhúsið í Skopun, leygard. 6. okt. kl. 15.00.

# Gulli við nýskapandi fløgu

**Seinni í hesi vikuni kemur nýggj fløga við Human Caos út. Hetta er ein heldur óvanlig útgáva, tí umframt nýggju sangirnar, hevur Gulli Johansen eisini lagt tvey sjónbandaløg og ein MP3-spælara á fløguna**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Gulli Johansen er ein tónleikaligur einmansherur. Hann skrivar, spælir inn og gevur út sín egna tónleik, og seint í komandi viku kemur nýggj fløga hjá honum út.

Gulli gongur undir navninum Human Caos, og nýggja fløgan fløgan kallast Self Destruct.

Hetta er ikki ein vanlig útgáva, tí umframt nýggju sangirnar, hevur Gulli eisini gjørt tvey sjónbandaløg, sum eru løgd á fløguna. Harafturat hevur hann eisini forritað ein MP3-spælara, sum fylgir við fløguni.

- Eg vil gera okkurt, sum ikki er gjørt fyrr, og tað kostar mær einki eyka at gera hesa fløguna, men afturfyri verður fløgan eitt sindur meir áhugaverd, sigur Gulli Johansen, sum framleiðir allan tónleikin í heimastudio sínum, sum hann kallar ghj-production.



*Gulli Johansen gevur seinni í hesi vikuni út nýggja fløga, sum øðrvísi enn allar aðrar føroyskar útgávur higartil*

## Harður tónleikur

Tónleikurin hjá Human Caos er Industrial Metal, har harður rocktónleikur verður blandaður saman við dance, tehno, rapp og øðrum tónleiki.

Gulli hevur meira enn einaferð gjørt vart við seg seinnu árini. Hann hevur luttikið á Prix Føroyum, og herfyri var hann eisini við á eini Free Føroyar konsert.

Gulli framførir sín tónleik einsamallur á pallinum, og harði tónleikurin verður kryddaður við sermerktari framførslu, har Gulli ikki er bangin fyri at liva við tónleikinum og gera seg út við máling og ørðvísi klæðum.



# Heimligar skúlabøkur







**Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út tvær skúlabøkur, sum hvør í sínum lagi bróta upp úr nýggjum**

ÚTGÁVUR

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út tvær skúlabøkur, Hervør og Høgni, sum er nýggj og slóðbrótandi lesibók til 1. flokk, og Náttúra og Tøkni 2, sum er grundbók og arbeiðsbók, ætlað til undirvísing í lærugreinini Náttúra og tøkni í 5. flokki. Lesibókina hevur Hjørdis Heindriksdóttir, lærari, skrivað og Olivur við Neyst, listamaður, hevur myndprýtt. Náttúra og tøkni hava lærararnir Hallur Ellingsgaard, Jenny Lydersen og Petur Ove Petersen skrivað. Óli Petersen hevur teknað myndirnar til grundbókina, og Janus Dam Guttesen til arbeiðsbókina.

## Lesibókin

Hervør og Høgni í skúla er um tvíburasystkini, ið fara í 1. flokk. Familjan, skúlin, gerandisdagurin, høgtíðirnar, Føroyar og heimurin eru tey evni, sum eru viðgjørd í bókini. Miðað verður eftir, at so fjøltáttaðir lesiinnlæringarhættir sum gjørligt verða nýttir. Innihaldið í tekstinum er gerandisligt og heimligt, og umráðandi er, at næmingarnar kenna seg aftur í tí teir lesa. Nógvu og litføgru myndirnar skapa lív í og birta óivað upp undir gott prát um ymisk evni í flokkinum. Tilfarið hevur verið roynt í skúlunum kring landið og hevur fingið drúgva viðgerð av royndum lærarum.

Lesibókin er 104 blaðsíður við myndum og kostar 120 krónur. Umframt læraravegleiðing eru tvey arbeiðshefti gjørd til lesibókina, har næmingarnir kunnu venja skriving og styrkja lesiinnlæringina. Tað seinna arbeiðsheftið kemur eftir jól.

Gramar hevur staðið fyri prentgerðini, og prentsmiðjan Oddi hevur prentað. Arbeiðsheftið hevur Dimmalætting prentað.

## Grundbókin

Náttúra og tøkni 2 er onnur bókin í hesi bókarøð. Fyrsta bókin kom til skúlaársbyrjan í 1999, og triðja og seinasta bókin í røðini er í gerð.

Náttúra/tøkni er ein nýggj lærugrein, ið kom við teirri nýggju fólkaskúlalógini. Henda lærugreinin leggur upp til at sameina fýra náttúrulærugreinir til eina heild. Lærugreinirnar eru landafrøði, alis-/evnafrøði og lívfrøði. Við støði í heimligu náttúruni skulu næmingar við egnum royndum sleppa at eygleiða og kanna lívfrøðilig, landafrøðilig og alis-/evnafrøðilig fyribrigdi, ið eru grundarlagið undir tilveru okkara um allan heim. Bókarøðin er gjørd soleiðis, at næmingarnir hava eina grundbók við kunnandi tilfari um evni. Hendan er 149 blaðsíður við myndum og tekningum og kostar 180 krónur.

Í arbeiðsbókini eru 83 arbeiðsuppgávur, har næmingarnir sjálvir kunnu kanna, eygleiða, gera ymiskar royndir og soleiðis fáa størri innlit í lívsgrundarlagið hjá plantum, djórum og menniskjum, umframt innlit í samspælið millum menniskju og náttúru.

Arbeiðsbókin er 123 blaðsíður við tekningum og kostar 64 krónur. Umbróting, repro og prentumsiting hevur Repro-Z havt ábyrgdina av.

# Fløvi byrjað aftur

**Allir pensjónistar í Eysturoynni eru vælkomnir**

PENSJÓNISTAR
*Turið Kjølbro*

Dagtilhaldið fyri pensjónistar í Eysturoynni, Fløvi, er byrjað aftur. Tilhaldið heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag á Glyvrum.

Hetta er 11. árið, at dagtilhaldið er opið. Dentur verður lagdur á, at so nógv sum gjørligt koma at vitja. Tey, ið standa fyri tilhaldinum, heita tískil á avvarðandi hjá óhjálpnum pensjónistum um at hjálpa sínum í at koma til og frá staðnum trygt.

Allir pensjónistar í Eysturoynni í øllum aldri eru vælkomnir at taka lut í tiltøkum, sum Fløvi skipar fyri í vetrarhálvuni. Opið er vanligar dagar frá kl. 15.00 til 18.00.

# Viðkvæmur virðisbrævamarknaður

**Yvirgangurin móti USA ger tað torført at meta um marknaðirnar komandi tíðina, og Kaupting Føroyar mælir tí til varsemi**

BÚSKAPUR
*Turið Kjølbro*

Virðisbrævamarknaðir kring allan heim fingu eitt skot fyri bógvin, týsdagin fyri tveimum vikum síðani, tá ið yvirgangsatsóknirnar vórðu framdar í USA. Hvussu útlitini eru fyri framman, veldst um, hvat fer at henda. Velur amerikanska stjórnin at hevna atgerðina við hernaðartiltøkum, kann støðan gerast alsamt fløktari og leingja óvissuna á virðsbrævamarknaðunum, verður sagt í ritinum hjá Kaupting Føroyar, Útlit og rák, sum júst er komið. Hinvegin kunnu vit vænta, at partabrøv fara at liggja hægri við árslok, um ein loysn fæst á politisku trupulleikunum nakað skjótt.

Mótvegis partabrøvnunum klára stutt lánsbrøv seg væl í politisku kreppuni, tí búskapirnir sum er hava tað trupult. Kaupting Føroyar mælir tí til varsemi næstu dagarnar og til at halda seg til stutt statslánsbrøv til greiðari er, hvussu marknaðurin fer at verða. Somuleiðis metir stovnurin, at fólk ikki eiga at hava ov nógv av realkredittlánsbrøvum, sum kunnu verða harðari rakt enn statslánsbrøv.

Kaupting Føroyar staðfestir sostatt, at yvirgangurin móti USA ger tað torført at meta um marknaðirnar komandi tíðina. Í Útliti og ráki ber komandi tíðina til at fylgja við, hvørjar metingar eru um búskapargongdina.

# Lærlingatalið veksur aftur

**-Í 1994 vóru 48 nýggir lærlingar í Føroyum. Í ár 2000 var talið 280. Av øllum lærlingunum í Føroyum í ár, eru heili 57,4 í Havnini.**

YRKISÚTBÚGVINGAR
*Ingrid Bjarnastein*

Í ársfrágreiðing hjá Yrkisútbúgvingarráðnum/Yrkisdeplinum stendur at lesa, at lærlingatalið í Føroyum fall munandi frá 1987- 1994. Kreppan fyrst í 90´unum sæst týðiliga aftur í lærlingatilgongdini. Stóra fráflytingin í Føroyum um hetta mundið hevur uttan iva sett síni spor. Tølini fyri nýggjar lærlingar eru frá 1987 til 1994 fallin við upp til 92 lærlingum um árið. Tilsamans í tíðarskeiðnum 1987 — 1994 fall lærlingatalið við 322 lærlingum, og gevur hetta eitt miðaltal á umleið 40 lærlingar um árið.

## Lutfallið ójavnt

Um hugt verður eftir teimum ymisku yrkisøkinum, so eigur Havnin størsta partin av lærlingunum í ár 2001. Innan handverk hevur Havnin nærum 60% av lærlingunum, meðan Eysturoyggin liggur á øðrum plássi við 23,9%. Hinar oyggjarnar hava tilsamans bert 18% av handverkaralærlingunum í Føroyum

Á yrkisøkinum, skrivstova & handil, er lærlingatalið í Havn aftur nógv tað størsta. Heili 78% av lærlingunum innan hetta yrkisøkið eru í Havnini, meðan bert 11,9% í Eysturoynni. Hinvegin kann tó leggjast afturat, at talið á handverkarlærlingum 1. januar í ár var 590, meðan tað bert vóru 159 skrivstovulærlingar.

## Tølini vaksa

Síðani ógvusliga fallið yvir hesi átta árini, er talið nú farið at vaska aftur. Bert frá 1994 til 1995 vaks talið við 103 nýggjum lærlingum. Tølini eru síðani vaksin støðugt, og í ár 2000 vóru 280 nýggir lærlingar. Hetta talið er ikki eins stórt og í 1987, men við vaksandi tilgongdini verður talið helst størri aftur komandi ár.